# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hans Jacob til móttøku hjá býráðsformanninum

Í sambandi við at Hans Jacob Hansen í Havn hevur havt sín seinasta arbeiðsdag hjá Tórshavnar kommunu, aftaná 25 ár í starvi, var hann til móttøku hjá borgarstjóranum Heðin Mortensen fríggjadagin 21. oktober.

Dagin eftir, tann 22. oktober, fylti Hans Jacob 80 ár.

Hans Jakku, ið er Havnarmaður við stóra H, hevur starvast á vegdeildini, í Gundadali og í Mylnugøtu. Áðrenn tað hevði hann verið sjómaður í mong ár.

Hann var giftur við Laurinu, vanliga nevnd Ninna, ættað úr Kollafirði. Hon andaðist í fjør, 75 ára gomul. Tey høvdu annars kunna hildið gullbrúdleyp í ár.

Á móttøkuni handaði býráðsformaðurin honum nýggju Býarsøguna, blómutyssi og nál við búmerkinum hjá Tórhavnar kommunu.



*Býráðsformaðurin Heðin Mortensen og Hans Jacob Hansen, sum nú er givin hjá Tórshavnar býráð*

## Sangur og lívsfrásagnir á Tjóðpalli Føroya

Mong eru tey, sum fara gjøgnum truplar tíðir, og sum spyrja seg sjálv, um Gud man leggja nakað í tey, ella um tey munnu vera nakað verd.

Sunnudagin 13. november kl. 20.00 verður tiltak á Tjóðpalli Føroya í Tórsgøtu 9 í Havn við sangi, tónleiki, videoklippi og lívsfrásagnum. Evnið verður: "Tú hevur virði stórt."

Luttakandi verða m.a. Anna Háberg, Karl Johannesen, Bjarni Jøkladal, Petur Háberg og Jógvan Zachariassen.

Atgongumerki á 30 kr. fáast í Kunningarstovuni í Niels Finsensgøtu 13.



### Andlát og jarðarferðir

**Knút Eiler Thorsvig,** Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 8. november, 61 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin klokkan 18.

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Knút, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Oliva Jacobsen**, Sandavágur, andaðist á Ellisheiminum í Miðvági týsdagin 8. november, 86 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Sólrun Holm**, fødd Winther, í Havn, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist 7. november, 88 ára gomul.

Jarðarferðin verður leygardagin 12. november klokkan 12 úr Samuels kirkjuni.

Tey, sum vilja minnast Sólrun kunnu lata Sands kirkju eina gávu. Konto í peningastovnunum.

### Dagurin í morgin

**11. november . Mortansmessa**. Til minnis um biskupin Martin í Tours í Fraklandi. Hann var føddur í tí, sum nú verður rópt Ungarn. Sum pápin var hann fyrst hermaður, men gav seg ungur í kirkjuliga tænastu, har hann skjótt kom fram. Hann var kosin til biskup í Tours.

Mortan var verndarhalgimenni hjá øllum húsdýrum og hjá drykkjumonnum. Navnið er latínskt og merkir *stríðshugaður*.

### 70 ára føðingardagur

Leygardagin 12. nov. verður Hagbard Dalfoss 70 ár. Tey, sum vilja heilsa upp á Hagbard, eru vælkomin inn á gólvið hjá dótrini í Marknalíð 3 (leygardagin) millum kl. 10.00 og 14.00, har hann verður at hitta.

### Diamantbrúdleyp

Mánadagin 14. november hava Ketty og Magnus Hamrá í Hósvík diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

†

Kunngjørt verður, at okkara kæra kona,
mamma, vermamma, omma og langomma

**Sólrun Holm**
fødd Winther í Tórshavn,
búsitandi í Keypmannahavn

andaðist 7. november 88 ára gomul.

Jarðarferðin verður leygardagin 12. november
kl 12.00 úr Samuelskirkjuni.

*Familjunnar vegna*
**Kristian og Gunnvá**

Tey, ið vilja minnast Sólrun, kunnu lata Sands kirkju eina gávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at kæri
maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Knud Ejler Thorsvig**
Tórshavn

andaðist týsdagin 8. november 61 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin 11. november kl 18.00

Jarðarferðin verður frá kirkjugarðskapellinum
leygardagin 12. november kl 13.00

*Familjunnar vegna*
**Marita, Annika, Eyðun og børnini**

Tey, ið vilja minnast Knud, kunnu lata Føroya felag móti
Krabbameini eina gávu, konta í peningastovnunum